## DAGSINS MEINING

# Taparin - situr kanska við lyklinum

Sjálvstýrisflokkurin og nýggi formaðurin í flokkinum taptu eyðmýkiliga á fólkatingsvalinum týsdagin. Politiskir eygleiðarar skilja ikki, at formaðurin ikki beinanvegin valkvøldið boðaði frá, at hann legði frá sær. Valúrslitið kann ikki tulkast øðrvísi enn eitt stórt misálit á formannin. Sjálvt trúgvir veljarar sótu heima fyri at mótmæla framferðini í samband við formansvalið í flokkinum herfyri.

Í grundini harmar lagnuvalið hjá Sjálvstýrisflokkinum mangan. Flokkurin hevur havt ein týðandi leiklut. Síðani heimastýrisskipanin varð sett í gildi, hevur flokkurin við næstan hvørt val sitið í tí støðu, at hann kundi avgera, hvør landsstýrissamgonga skuldi skipast.

Veljarakanningar hava í seinastuni bara givið flokkinum ein løgtingslim, og um fólkatingsvalið var eitt løgtingsval, hevði hann ongan løgtingslim fingið. Hetta má geva floksleiðsluni høvuðbríggj. Um vanligt skil framvegis er galdandi í flokkinum, má annaðhvørt politiski formaðurin, Sámal Petur í Grund, ella formaðurin í landsfelagnum, Edvard Hermansen, víkja. Teir draga ikki somu línu, og annar má ábyrgjast fyri tapið.

So er spurningurin, um undanfarni formaðurin, Helena Dam á Neystabø – sum óivað tók ta røttu avgerð at taka seg aftur sum formansevni fyri at sleppa undan einum stríðsvali stutt undan einum fólkatings- og løgtingsvali – bíðar aftan fyri leiktjøldini, til tann rætta løtan er komin. Tað tykist sum um Helena er tann einasta, sum kann bjarga flokkinum ein løgtingslim á løgtingsvalinum, hóast atkvøðutalið týsdagin ikki júst skapar bjartskygni og gevur nøkrum áræði.

Hendir tað, at Helena verður vald aftur á løgtingsvalinum fyri Sjálvstýrisflokkin, kemur hon aftur at sita í eini lyklastøðu. Sjálvstýrisgongdin má halda fram so ella so. Sjálv hevur hon nýliga sagt, at hon er fyri eini hóvsamari tilgongd í sjálvstýrismálinum.Tað skuldi latið upp fyri møguleikanum at fingið fleiri flokkar við í tilgongdina. Meiriluti er neyvan fyri fullveldisleiðsluni hjá samgonguni. Hvørki millum veljarar sum heild, ella í Fólkaflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum.

Harafturat er neyðugt við eini breiðari semju í sjálvstyrismálinum. Fáa vit ikki eina loysn, sum einir tveir triðingar av veljarunum taka undir við, verður hon ikki haldgóð. Vit enda aftur í toganini millum samband og sjálvstýri, sum fyrru helvt í farnu øld, forðaði fyri eini samfelagsligari menning. Tá kom Javnaðarflokkurin upp í politikk og mong mál vórðu loyst úr lagdi, bæði sosial- og vinnumál. Neyvan fæst nøkur loysn í sjálvstýristilgondini uttan at Javnaðarflokkurin er við og aftur her situr kanska ein endurskipaður Sjálvstýrisflokkur við avgerandi lyklinum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Langir knívar og langar nasar

**Heri Eysturlíð**
*Stockholm*



Javnaðarhøvdingin og fyrrverandi fólkatingsmaðurin Jóannes Eidesgaard er so óførur at filosofera um søguligar nætur. Tiltiknar eru hansara hugleiðingar í vár um Krystallnáttina, ella De Lange Knives Nat, sum hann málbar seg í sonnum ríkisfelagsskapsanda.

Hóast hann helt seg hava ein krystallkláran boðskap til fólkatingsvalið, munnu bæði hann og politiski andsfaðir hansara Poul Nyrup Rasmussen fara at minnast valnáttina sum De Lange Næsers Nat.

Nyrup gjørdist brádliga Gammelrup. Ikki Eide á, Eidesgaard.

Tað er óhugnaligt og sigur ikki sørt um tað politiska medvitið hjá føroyingum, at ein so ússaligur retorikari sum Jóannes Eidesgaard, ið konsekvent samanber sínar politisku mótstøðumenn við eitt nú Hitler, Pol Pot og øll hugsandi ræðuveldi, skuldi gerast toppskorari til fólkatingsvalið. Hetta ódámliga garterilsið av føroyskum javnaðarfólki er eisini ironiskt, tá ið hugsað verður um, hvussu Javnaðarflokksins danski bróðurflokkur (les: móðurflokkur) bar seg at upp undir valið. Teirra boðskapur var sanniliga "krystallklárur" og bendi í summum førum tonkunum á til Týskland í tríatiárunum.

Tískil var tað óvilliga komiskt, tá ið eitt av valevnunum hjá Javnaðarflokkinum legði Tjóðveldisflokkin undir at hava somu meiningar sum Dansk Folkeparti - um undirgrundina! Javnaðarfloksins danski móðurflokkur kappaðist jú nettupp við Vinstra um at tekkjast Dansk Folkeparti - men um heilt onnur málsøki.

Tess stuttligari, at Høgni Hoydal basti Jóannesi Eidesgaard. Ella var tað Lisbeth?

Føroyingar kundu væl valt eitt frægari umboð enn hana danating. Men gott er - "hvor der handles, der spildes". Livst so spyrst, hvussu lætt Sambandsflokkurin fer at hava tað við sínum undirbrotleika mótvegis danskarum, nú alt Europa hevur sett teir í skammikrók.

Støðan er krystallklár. Góða Nátt, Eidesgaard.

# Kaos ?

**Edvard Hermansen**



Landstýrisfelag Sjálvstýrisfloksins hevði nevndarfund í gjárkvøldið, har gerast skuldi ein eftirmeting av valinum.

Sum landsfelagsformaður legði eg fyri og helt, at vána valúrslitið bara kundi leggjast floksformanninum til byrði, og skeyt upp, at hann tók við fylgjunum av hesum og víkti sæti sum floksformaður til frama fyri næstformannin, Eyðun Eltør.

Sámal P. í Grund helt, at hann einsmallur kundi ikki taka hetta niðurlagið og ósemjuna í flokkinum upp á seg, men at mín leiklutur í stríðnum var alt annað enn lítil, tí eg hevði úttalað meg til fjølmiðlarnar soleiðis, at hetta førdi meira ósemju við sær. Hett kann eg ikki geva honum rætt í, tí eg havi bara givið mítt boð upp á ta støðu, sum hann hevur ført flokkin út í.

So varð biðið um, at nevndin skipaði seg áður enn meira varð tosað Hetta varð játtað og úrslitið varð, at Ronald Poulsen varð kosin nýggjur formaður. Hetta tók eg til eftirtektar og lat sessin til nývaldað formannin, samstundis sum eg boðaði frá, at eg tók meg úr nevndini.

Hetta varð kanska ikki væntað, tí biðið varð um, at fundurin varð niðurlagdur, og semja varð um tað.

Eg kann ikki góðtaka, at málið ikki fær avleiðingar.

Støðan er nú, at ruðuleikin er fullkomin, skrællið størri, sárini djúpri!

Stóri taparin á fólkatingsvalinum, politiski formaður Sjálvstýrisfloksins, stendur sum sigursharri í einum sindraðum flokki. Hann bað um fólksins talu.

Fólkið hevur talað, men fyri deyvum oyrum.

Sosialurin
www.sosialurin.fo

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14:00

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Sambandsflokkurin vann fólkatingsvalið - løgtingsvalið verður í næstum

**Jákup Lamhauge**



Úrslitið av fólkatingsvalinum var, at Sambandsflokkurin varð stóri vinnarin - ja flokkurin setti met bæði í atkvøðutali og eisini søguliga við tað, at Lisbeth L.Petersen formaður flokksins varð vald - fyrsta kvinnuliga umboð føroya á fólkatingi.

Sum eitt av valevnum Sambandsflokksins eri eg sera fegin um góða valúrslit flokksins og vil eg nýta høvi at takka hjartaliga fyri dygga stuðulin sum flokkurin fekk kring landið - eisini ein hjartans tøkk til tey, sum stuðlaðu meg persónliga.

Fólkatingsvalið er nú av, og fyri framman stendur løgtingsvalið, sum verður um stutta tíð - áheitan mín til øll tey mongu, sum stuðlaðu Sambandsflokkin til fólkatingsvalið, skal vera: Haldið fast við støðuna soleiðis, at vit fáa eins gott úrslit til løgtingsvalið - føroyingar hava brúk fyri, at Sambandsflokkurin aftur fær sæti í Tinganesi.

*Framhald av síðu 11*

urtikin tann dag ímorgin um tað skal vera. Men treytirnar eru, at bilverjueigarin við hesum verður leysur av ábyrgdini fyri trygdini á vegnum.

Tað vilja fullveldisfólkini hinvegin ikki ganga við til. Tey vilja hava, at bilverjueigarin skal taka bilverjuna burtur, men at hann samstundis skal vera tann, sum hevur ábyrgdina fyri at tryggja, at føroyski samfelagsbilurin ikki koyrir útav. Fullgreið um, at tey ikki duga serliga væl at koyra sjálvi, vilja tey tí hava bilverjueigarin at vera teirra privatsjafførr. Men tað hevur bilverjueigarin ongan hug til. So nú eru fullveldisfólkini eisini óklár við bilverjueigaran, samstundis sum tey ynskja bilverjuna hagar pipari grør.

Tað syndarliga og óhugnaliga er, at fullveldisfólkini ikki eina tað einastu ferð, í sansaleysu øði sínari inná bilverjuna og bilverjueigaran, hava tikið minsta stig til at royna at forða fyri einari nýggjari vanlukku. Tíansheldur at hjálpa teimum, sum komu illa fyri av teirri seinastu. Bilurin er í nærum sama ringa standi, sum hann var í, tá hann fór av vegnum á sinni, og rendi í bilverjuna. Enn einaferð koyrir hann við ov stórum lessi. Dekkini eru niðurslitin, so hóast koyrilíkindini beint nú eru góð, er alstórur vandi fyri einum nýggjum samanstoyti nær tað skal vera. Í stýrhúsinum klandrast fullveldisfólkini um rattið og speedaran. So við hetta lag er alt bara ein spurningur um tíð.

Enn stendur bilverjan uppi, og vónandi heldur hon, um føroyski samfelagsbilurin enn einaferð fer út av vegnum. Men við tí serliga føroyska fullveldishugburðinum fer enn ein bjarging frá avgrundini, í stundini, at vera tulkað sum, at bilverjan enn einaferð hevur gjørt føroyingum órætt. Og fullveldisfólkini fara enn einaferð at finna troyst í, at tað var bilverjan sum breyt bilin - og ikki tann skilaleysa koyringin.

Sosialurin
www.sosialurin.fo

TØKK



Góðu javnaðarveljarar

Eg takki fyri stóra persónliga stuðulin, ið varð vístur mær á fólkatingsvalinum.

Jóannes Eidesgaard

JAVNAÐARFLOKKURIN